## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Heidi og Regin Guttesen:

# Trúboðarar nærhendis Napoli í Italia

Tað eru kanska fleiri her á landi, sum spyrja, hvar kendi tónleikarin og tónasmiðurin Regin Guttesen í Havn bleiv av.

Regin býr í dag saman við konuni Heidi og soninum Noah nærhendis Napoli í Italia, har tey virka sum trúboðarar.

Tey fluttu til Italia fyri hálvum øðrum ári síðan og búsettust í lítla býnum Pozzuoli, nærhendis Napoli, sum er 3-størsti býur í Italia.

Regin er 31 ára gamal og útbúgvin grafikari. Hann lærdi hjá REPROZ í Havn.

Hann er sonur Ragnfríð og Gunnar Guttesen í Havn, og Heidi er dóttir Cathy, sum er amerikonsk, og Jógvan Júst Rasmussen, úr Klaksvík, sum eru trúboðarar á Filipsoyggjunum.

Síðan tey komu til Itaila, hava tey sett seg inn í málið og mentanina í landinum.

Tey eru við skotska trúboðarafelagsskapinum GLO (Gospel Literature Outreach).

Regin sigur, at endamálið hjá teimum er at stovna samkomur av evangeliskt trúgvandi italienarum.

Í Italia búgva 58 mill. fólk, har av 1 prostent av íbúgvunum eru evangeliskt trúgvandi, og hini eru fyri tað mesta katolikkar. Í Italia eru meira enn 30.000 kommunur ið onga evangeliska samkomu hava.

Familjan trívist væl í Italia. Tað tekur tíð at koma at kenna málið, fólkið og mentanina, men hetta er neyðugt, um tey skulu arbeiða í landinum. Ætlanin er, at tey skulu virka sum trúboðarar í onkrum øðrum býi í Italia, tá tey eru komin meiri inn í málið og mentaninna. Italienarar eru opnir og lættir at koma á tal við.

Ferðsluna skal man sanniliga venja seg við, tað virkar sum eitt stórt kaos, men tað venist man eisini við, sigur Regin.

Meðan tey eru í Føroyum, ferðast tey kring landið, vitja samkomur og greiða frá virki teirra í Italia.



*Regin og Heidi Guttesen og sonurin Noah búgva í dag nærhendi Napoli í Italia, har tey virka sum trúboðarar*

*Mynd: Tórvør Vang*

# Møðgur einsamallar við seglbáti

**Týsdagin kom ein seglbátur inn á Vestmanna við fronsku Miléne Isambert sum skipara. Hon og mamman, Catherine Isambert, hava siglt úr Norra til Íslands og síðan til Føroyar**

Miléne Isambert, sum er skipari í bátinum, er næstelst av 6 systkjum. Hon er nýliga útbúgvin sum lækni í Frankfurt.

Familjuni dámar væl at sigla, og tey eru so at siga uppvaksin í báti. Miléne hevur siglt so nógv saman við pápanum, at hon nú dugir sjálv at sigla við seglbáti.

Møðgurnar vóru eftir bátinum í Norra, síðan sigldu tær Íslands. Týsdagin í hesi vikuni komu tær inn á Vestmanna og mikudagin løgdu tær at í Vágsbotni.

Tær eru væl nøgdar við tænastuna tær fáa Bátafelagnum við at brúka teirra fasilitetir sum t.d. brúsu og vaskimaskinu.

Tá tær fara avstað aftur, verður dóttirin einsamøll við bátinum. Mamman fer heim aftur við flogfari. Tær eru sera hugtiknar av stórslignu náttúruni í Føroyum.

So tað er ikki bert okkara Durita Holm sum klára at sigla um høvini í seglbáti.




*Catherine Isambert og dóttirin Miléne við seglbátinum í Vestmanna seinasta týsdag*

*Mynd: Sámal Bláhamar*

†

Kunngjørt verður, at kæri maður mín og pápi okkara

**Finnbogi Ísakson**

andaðist mikudagin 7. september, 62 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni
sunnudagin kl. 14.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Ása, Jón og Høgni**

Tey sum vilja minnast Finnboga kunnu eisini lata Føroya Felag Móti Krabbameini eina gávu.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæra mamma, omma, langomma og vermóðir

**Ellen Marie Hansen f. Mikkelsen**
vanliga nevnd Ella, í Hósvík, ættað úr Gásadali

andaðist hósdagin 8. september, 87 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Hósvíkar kirkju
sunnudagin kl.14.

*Familjunnar vegna*

**Børnini**

Tey ið vilja minnast Ellu kunnu eisini geva cystisk fibrosefelagnum, eina gávu, konta í peningastovnunum.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá góði Preben, vores kære far

**Preben William Funch**
ættaður úr Gedser
búsitandi á Argjum

so brádliga andaðist.

Tøkk til Bjarna Bæk, prest, kirkjutænarar,
og tykkum sum komu í Vesturkirkjuna.
Tøkk fyri blómur, kransar og heilsanir.
Tøkk til leiðslu og starvsfólk á Færøernes Kommando og á Almannastovuni, og annars til øll. sum á ymsan hátt hava hjálpt og víst umsorgan.
Ein serstøk tøkk til tín Ingun.

*Familjunnar vegna*

**Jónfríð**
**Jesper og Henriette**